

## Færri GM starvsfólk í Evropa

General Motors í Evropa, við bilmerkjunum Opel, Vauxhall og Saab, skulu minka um arbeiðsmegina við umleið 5.900 starvsfólkum í 2008. Hetta upplýsir týska bilmagasinið "Auto, Motor und Sport", som endurgevur keldur á evropeiska høvuðskvarterinum hjá General Motors í í Zürich. Verksmiðjurnar eru í Belgia, Stórabretlandi, Spania, Týsklandi og í Trollhättan í Svøríki.

# Lehman í sváRari kreppu



*Lehman Brothers er í sonnum fíggarligum brotasjógvi eftir kollapsið av húsalánsgrunnunum, Fannie Mae og Freddie Mac*

**Lehman Brothers samráddust í gjárkvøldið við møguligar keyparar – teirra millum Bank of America – í einari seinastu roynd at bjarga bankanum, eftir at íleggjarar ikki góðtóku bjargingarætlanini, sum bankin hevði arbeitt við**

FÍGGJARKREPPA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Partabrævakursurin í Lehman Brothers, sum hesa vikuna er farin niður í eina helvt, kavaði 41,8% aftur í gjár tá tað kom fram, at bankin kanska ikki megnaði at halda fram sum ein sjálvstøðug eind.

Lehman stjórnarlimir við forstjóranum, Dick Fuld á odda, byrjaðu at seta seg í samband við aðrar kappingarneytar gjáramorgunin, eftir at partabrøvini fullu ógvusliga á marknaðinum. Í gjárkvøldið vóru fleiri bankar í sambandi við Lehman við tí í hyggju at keypa allan bankan ella part av honum. Umframt Bank of America verður mett, at Barclays er millum hinar áhugaðu bankarnar.

Hvørki Lehman, Bank of America ella Barclays vildu tó gera viðmerkingar. Financial Times, sum ber tíðindini, fekk ikki fatur á Nomura í Japan, sum verður hildin at vera millum møguligu keypararnar, til eina viðmerking.

Bankafólk siga, at amerikansku myndugleikarnir heita á fíggjarstovnar um at halda fram at handla við Lehman, samstundis sum teir løgdu trýst á bankan um at fáa eina avtalu í lag til tann prís, sum marknaðurin er til reiðar at gjalda. Fíggjarmálaráðið vildi ikki gera aðra viðmerking enn at tað var í sambandi við luttakarar á marknaðinum.

Seint í gjárkvøldið tók Fíggjarmálaráðið ikki beinleiðis lut í samráðingum um sølu av Lehman, og vóru heldur ikki í samráðingum við aðrar partar av stjórnini um stuðul til ein handil.

### Starvsfólk í villareiði

Støðan broytist tó skjótt og tað var framvegis ein møguleiki fyri, at ein møguligur keypari kundi fáa stjórnartrygd á sama hátt sum tá JPMorgan Chase keypti Bear Stearns í mars í ár. Summir analytikar halda, at Fíggjarmálaráðið kann verða biðið um at taka kredittvirði vegna handilsligu ognarpartabrøvini hjá Lehman á sama hátt, sum tað tók á seg alla uttan ta fyrstu milliardina dollara skuldina av teimum 30 milliardunum av ognarvirði við ognartrygd hjá Bear.

Amerikansku myndugleikarnir fylgja ikki fegnir hesum fyrsta dømi, men møguleikin er framvegis opin fyri, at skipaði vandin í sambandi við møguleikan fyri einum spakuligum kollapsi av einum leiðandi íløgubanka, kann føra til eina slíka handling.

Trýstið at finna ein keypara ella íleggjara øktist eftir at íleggjarar gjørdu av, at løgdu ætlanirnar mikudagin at selja ivasomu handilsligu ognirnar og minka um virksemi annars, ikki vóru nóg mikið.

ChartMoody's ávaraði um, at tað helst fór at niðurrata kredittratingina hjá Lehman, um bankin ikki skjótt fann ein keypara. Kostnaðurin at tryggja virðið á skuldini hjá Lehman vaks heilt upp í 805 grundstig í gjár, áðrenn hann aftur fall tá tað gjørdist greitt, at bankin royndi at finna ein keypara.

10-ára lánsbrøvini hjá Lehman vóru seld á kreppuraktum støði.

Ein annar møguleiki hjá Lehman er at góðtaka ein skjótan handil av meiriluta partabrøvini í teirra dóttirfeløgum til tess at skapa alneyðugan kapital.

Væntandi er, at fleiri privatir framtaksgrunnar fara at leggja inn eitt síðsta boð um vikisfitið, halda keldur, sum stand banknum nær, hóast ein endalig loysn enn ikki er í ljósmála.

Turbulensurin merktist týðiliga á starvsfólkunum.

Vit hava 25.000 fólk sitandi her og gráta, segði ein deildarleiðari í gjár, eg vóni bara ein loysn finst, skrivar Financial Times.

# Lene fram við sjey tinglimum



*Lene Espersen er væl dámd millum danir*

**Ein nýggj Megafon kanning fyri TV2, sum er gjørd eftir formansskiftið hjá teimum konservativu, gevur Lene Espersen framgongd**

POLITIKKUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Við seinastu kanningina hjá Megafon 28. august, fingu tey konservativu 9,9% av atkvøðunum. Tað talið er nú økt til 14%.

Um val var í dag, høvdu tey konservativu fingið sjey tinglimir fleiri í fólkatinginum.

Framgongdin hjá teimum konservativu gongur fyrst og fremst út yvir Radikala Vinstra, sum gongur aftur við 2,1 síðani síðstu kanning, og Socialdemokraterne, sum gongur aftur 1,4% og Vinstra, ið somuleiðis gongur aftur 1,4%.

Við seinastu kanning hevði vinstrivongurin yvirhálað borgarliga vongin við 90 mandatum móti 85. Nú hevur stjórnin saman við Dansk Folkeparti aftur framman fyri við 92 mandatum móti 83.

Tølini frá Megafon vísa eisini, at 35% av frammgongdini hjá teimum konservativu einans er takkað verið veljarum, sum »dáma væl« Lene Espersen sum persón, skrivar danska blaðið Børsen.